LM-006/2025

# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 22. august 2025 |
| Mál nr.: | 25/14790 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 2.-22. juli 2025 |
| Eftirkannað: | 6. august 2025 |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

(Heitið "gistingargjald" verður broytt til "burðardygdargjald", burðardygdargjald verður avroknað eina ferð um árið, TAKS fær heimild at krevja upplýsingar, roknskapartilfar o.tíl., ásetingar um rentu, innheintan, panting og afturhald í inntøku verða settar inn, broytt revsiáseting o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024 um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 13, stk. 1, verður: "gistingargjald" broytt til: "burðardygdargjald".

**2.** Í § 13, stk. 2, verður: "gistingargjaldið" tvær staðni broytt til: "burðardygdargjaldið".

**3.** Í § 13, stk. 3, verður: "Seglbátar" broytt til: "Stuttleikabátar" og "gistingargjaldið" broytt til: "burðardygdargjaldið".

**4.** § 13, stk. 4, verður strikað.

**5.** Aftaná § 13 verður sett:
"**§ 13 a**. Í seinasta lagi samstundis, sum sjálvuppgávan skal latast inn til TAKS, sambært § 100, stk. 3, í skattalógini, skal tann, sum krevur inn burðardygdargjaldið sambært § 13, stk. 2 og 3, lata TAKS uppgerð yvir upphæddina, sum er kravd inn undanfarna ár, umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS.
*Stk. 2.* Gjaldið skal vera goldið í seinasta lagi tann 20. mánaðin eftir endan av freistini sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Er gjaldið eftir stk. 2 ikki goldið, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.
*Stk. 4.* Gjaldið eftir stk. 2, skuldskrivað renta, innheintingarkostnaðir, sektir og onnur gjøld eftir hesi løgtingslóg, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting.
*Stk. 5.* TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum, tó er § 7, stk. 1, í lov om Inddrivelse af Skatter og Afgifter til det Offentlige m.m. ikki galdandi.

**§ 13 b**. TAKS kann krevja upplýsingar, kanna roknskapartilfar o.tíl. hjá teimum, sum eftir § 13, stk. 2 og 3, vegna landið krevja inn burðardygdargjald frá ferðafólki, og hjá øðrum, sum hava tilfarið um hendur.
*Stk. 2*. Fær TAKS ikki umbidnar upplýsingar, ella eru upplýsingarnar ófullfíggjaðar ella villleiðandi, um upphæddina, sum er kravd inn, metir TAKS um upphæddina og krevur inn samsvarandi gjald.
*Stk. 3*. TAKS kann heinta inn burðardygdargjald, skuldskrivaða rentu, innheintingarkostnaðir, sektir og onnur gjøld eftir hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum, sum hava skyldu at krevja inn burðardygdargjald, eftir reglunum í skattalógini."

**6.** Í § 15, stk. 1, verður: "og § 13, stk. 2-4" broytt til: ", § 13, stk. 2 og 3, og § 13 a, stk. 1."

**7.** Í § 15, stk. 3, verður "eftir § 8," sett: "ikki aktar boð eftir § 12, stk. 1, ella gevur TAKS ófullfíggjaðar ella villleiðandi upplýsingar."

**8.** Í § 16, stk. 2, verður: "1. oktober 2025" broytt til: "1. januar 2026".

**§ 2**

*Stk. 1*. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2025.
*Stk. 2*. Gjaldið, nevnt í § 13, sum er kravt inn í tíðarskeiðinum 1. januar-31. desember 2026, verður gjørt upp og goldið eftir teimum freistum í § 13 a, sum eru galdandi fyri gjaldið, sum er kravt inn í 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Burðardygdargjaldið, sum verður kravt inn eftir løgtingslógini, er markað til at gera ferðavinnuætlanir, at gera og halda viðlíka gøtur í haganum, undir hesum eisini bygdagøtur, umframt til onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna.

Til tess at tryggja, at gjaldið verður tikið frá øllum ferðafólkum, sum sambært løgtingslógini hava skyldu at rinda gjaldið, verður gjaldið lagt aftur at øllum gistingum, sum goldið verður fyri. Tó at burðardygdargjaldið verður lagt á gisting, er ikki talan um eitt gistingargjald, og heitið verður tí rættað til burðardygdargjald.

Sambært § 13 í ferðavinnulógini skulu tey, sum krevja inn burðardygdargjald, rinda landinum gjaldið eftir ásetingunum í løgtingslóg um ferðagjald, t.e. mánaðin eftir, at gjaldið er kravt inn. Ongar ásetingar eru um innheintan og panting.

TAKS hevur víst á, at verandi skipan við at avrokna burðardygdargjaldið eina ferð um mánaðin er umsitingarliga trupult og kostnaðarmikið, og at neyðugt er at gera hetta einfaldari. Somuleiðis hevur TAKS víst á, at heimildir vanta at m.a. innheinta og panta tað, sum ikki verður avroknað til landið til tíðina, eins og TAKS vantar heimild at krevja inn upplýsingar, roknskapartilfar o.a.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 13 í ferðavinnulógini skulu tey, sum krevja inn burðardygdargjald, rinda landinum gjaldið eftir ásetingunum í løgtingslóg um ferðagjald, t.e. mánaðin eftir, at gjaldið er kravt inn. Ongar ásetingar eru um innheintan og panting.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið, sum er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið og TAKS, hevur til endamáls at gera tað einfaldari at avrokna burðardygdargjaldið til landið, eins og uppskotið hevur til endamáls at áseta reglur um, at TAKS kann krevja upplýsingar, roknskapartilfar o.tíl., umframt reglur um innheintan, panting og afturhald í inntøku. Hetta verður gjørt við at áseta, at burðardygdargjaldið verður avroknað eina ferð um árið.

Fyri at geva vinnuni betri stundir at fyrireika seg at krevja inn burðardygdargjald verður skotið upp at útseta gildiskomuna frá 1. oktober 2025 til 1. januar 2026. Til tess at tryggja, at TAKS er tøkniliga til reiðar at taka ímóti gjaldinum, verður samstundis skotið upp, at burðardygdargjald, sum er kravt inn í tíðarskeiðinum 1. januar 2026 til og við 31. desember 2026, verður gjørt upp fyrstu ferð 1. mai 2027 og avroknað til landið 20. juni 2027.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Løgtingslógin verður broytt soleiðis, at burðardygdargjaldið, sum verður kravt inn fyri gistingar, verður avroknað til landið eina ferð um árið. Samstundis verða ásettar reglur um, at TAKS kann krevja upplýsingar, roknskapartilfar o.tíl., umframt reglur um innheintan, panting og afturhald í inntøku.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið, sum er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið og TAKS, varð sent Fíggjarmálaráðnum, TAKS og Ferðavinnufelagnum til hoyringar.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 2. juli-22. juli 2025.

Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**
**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Talan er um eitt nýtt gjald, sum TAKS skal krevja inn vegna landið, og tí er neyðugt at fáa til vegar eina nøktandi kt-loysn, so tað verður so einfalt og ómakaleyst sum gjørligt at flyta TAKS innkravt gjald.

Fígging krevst til hetta, eins og nakað av fíggjarligari orku eisini skal brúkast at kunna viðskiftafólk um nýggju skipanina. TAKS metir, at kostnaðurin er uml. 800.000 kr.

Broytingin hevur annars fyri landið ta positivu fíggjarligu og umsitingarligu avleiðing, at umsitingin av at krevja inn burðardygdargjald við tíðini verður einfaldari og tí eisini ódýrari.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur fyri landið ta positivu umsitingarligu avleiðing, at umsitingin av at krevja inn burðardygdargjald fyri gisting verður einfaldari.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur fyri vinnuna ta positivu avleiðing, at tað verður umsitingarliga einfaldari og tí eisini ódýrari av avrokna innkravt burðardygdargjald eina ferð um árið heldur enn eina ferð um mánaðin.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Lógaruppskotið broytir ikki hesi viðurskifti.

Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá*

*einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið ásetur, at renta verður roknað, um burðardygdargjaldið ikki er goldið landinum innan fyri freistina, og at burðardygdargjald og renta, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting.

Lógaruppskotið ásetur somuleiðis, at TAKS hevur heimild at krevja upplýsingar, kanna roknskapartilfar o.tíl. hjá teimum, sum vegna landið krevja inn burðardygdargjald frá ferðafólki, og at TAKS fær heimild at meta um upphæddina og krevja inn samsvarandi gjald, um TAKS ikki fær umbidnar upplýsingar um upphæddina, sum viðkomandi hevur kravt inn. Gjaldið kann verða afturhildið í A-inntøkuni hjá tí, sum hevur skyldu at krevja inn og avrokna burðardygdargjald.

Revsiásetingin verður broytt soleiðis, at tann, sum letur vera við at rinda landinum burðardygdargjald, sum viðkomandi hevur skyldu at krevja inn, og tann, sum letur TAKS ófullfíggjaðar ella villleiðandi upplýsingar, verður revsaður við sekt.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur teimum, sum krevja inn burðardygdargjald fyri gisting at avrokna gjaldið til landið eina ferð um árið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Eins og eftir galdandi løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu er tað TAKS, sum tekur ímóti og krevur inn burðardygdargjald fyri gisting. Aðrar heimildir eru ikki í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1-4**
Tó at burðardygdargjaldið verður lagt á gisting, er ikki talan um eitt gistingargjald. Heitið verður tí rættað til burðardygdargjald.

Ásetingin í § 13, stk. 3, verður broytt til tess at nágreina, at talan ikki einans er um seglbátar, men heldur um allar stuttleikabátar, íroknað m.a. seglbátar.

Ásetingin í § 13, stk. 4, verður strikað, av tí at nýggjar ásetingar eru gjørdar um, hvussu burðardygdargjald verður avroknað til landið o.a. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 5, niðanfyri.

**Til § 1, nr. 5**
Ásetingin um, hvussu burðardygdargjald verður avroknað til landið, er flutt til nýggja § 13 a og broytt soleiðis, at burðardygdargjaldið verður avroknað til landið eina ferð um árið, heldur enn eina ferð um mánaðin.

Ásett verður, at tann, sum hevur skyldu at krevja inn burðardygdargjald, á hvørjum ári skal lata TAKS eina talgilda uppgerð yvir upphæddina, sum er kravd inn árið fyri. Freistin at lata TAKS uppgerðina er samstundis, sum sjálvuppgávan skal latast inn, t.e. ávikavist 1. mai fyri likamligar persónar og 1. juli fyri løgfrøðiligar eindir. Freistin at rinda gjaldið er sett til tann 20. mánaðin eftir, t.e. ávikavist 20. juni fyri likamligar persónar og 20. august fyri løgfrøðiligar eindir. Hetta er í samsvari við tær freistir, sum TAKS vanliga brúkar, so skipanin er so einføld sum gjørligt.

Samstundis verður ásett, at renta upp á 0,7% verður roknað, um gjaldið ikki er goldið landinum innan fyri freistina. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Afturat hesum verður ásett, at burðardygdargjald, skuldskrivað renta, innheintingarkostnaðir, sektir og onnur gjøld eftir hesi løgtingslóg, ið eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting.

TAKS fremur panting eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum, tó so, at 2-ára pantingarfreistin í § 7, stk. 1, í lov om Inddrivelse af Skatter og Afgifter til det Offentlige m.m. ikki er galdandi.

Í § 13 b verður ásett, at TAKS hevur heimild at krevja upplýsingar um eitt nú gistingarnætur, kanna roknskapartilfar o.tíl. hjá teimum, sum eftir § 13, stk. 2-3, vegna landið krevja inn burðardygdargjald frá ferðafólki, og hjá øðrum, sum hava hetta tilfarið um hendur, t.d. bókhaldarar og grannskoðarar.

Um TAKS ikki fær umbidnar upplýsingar, ella eru upplýsingarnar um upphæddina, sum er kravd inn, ófullfíggjaðar ella villleiðandi, metir TAKS um upphæddina og krevur inn samsvarandi gjald. Til tess at gera eftirlitið einfaldari skal TAKS – tá metast skal um upphæddina – ikki leggja upp fyri, hvussu leingi ferðafólk møguliga hava gist á øðrum stað.

At enda verður ásett, at TAKS eftir reglunum í skattalógini fær heimild at heinta inn burðardygdargjald, skuldskrivaða rentu, innheintingarkostnaðir, sektir og onnur gjøld eftir hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum, sum hava skyldu at krevja inn burðardygdargjald.

**Til § 1, nr. 6-7**
Revsireglurnar í § 15 verður broyttar samsvarandi broytingunum í § 13 og § 13 a.

Afturat hesum verður ásett, at tann, sum gevur TAKS ófullfíggjaðar ella villleiðandi upplýsingar, verður revsaður við sekt.

**Til § 1, nr. 8**
Til tess at geva vinnuni betri stundir at fyrireika seg til at krevja inn burðardygdargjaldið verður gildiskoman flutt frá 1. oktober 2025 til 1. januar 2026.

**Til § 2**
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. oktober 2025.

Somuleiðis verður ásett, at gjaldið, nevnt í § 13, sum er kravt inn í tíðarskeiðinum 1. januar 2026-31. desember 2026, verður gjørt upp og goldið eftir teimum freistum, sum eru galdandi fyri gjaldið, sum er kravt inn í 2026.

Tað merkir, at ávikavist likamligir persónar og løgfrøðiligar eindir skulu lata TAKS uppgerð yvir alt tíðarskeiðið frá 1. januar 2026 til 31. desember 2026 í seinasta lagi 1. mai 2027 ella 1. juli 2027, og avrokna tað í seinasta lagi 20. juni 2027 ella 20. august 2027.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 22. august 2025

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur